handVERKARIN

BLAÐ NR. 54

HAVNAR HANDVERKARAFELAG

UMSITING OG STARVSFÓLK Á SKRIVSTOVU OKKARA

Gudny Skarðhamar

Gudny hevur skrivstovuútbúgving og yvirbygna innan rokniskap. Hon hevur starvast á skrivstovuni síðani 2011. Hon tekur sær av eftirløn, sjúkragrunninum .o.s.v.

Jonna Skaale

Jonna hevur starvast á skrivstovuni síðani 2010. Jonna hevur bankaútbúgving,og tekur sær av limarøkt, limasamskifti. o.a.

Í blaðnum hesa ferð: **síða**

Skrivstovufólk . . . . . s. 2
Sjónarhornið: Eli Brimsvík . . . . . s. 4
Professari gjørdist rektari . . . . . s. 6
TEMA: Móttøka í tekniska skúla . . . . . s. 6
Rigmor Dam . . . . . s. 12
Helena Dam á Neystabø . . . . . s. 16
Herleif Hammer . . . . . s. 14
Bogi B. Jensen, takkartala . . . . . s. 20
Arbeiðsgongdin . . . . . s. 22

Marita í Brekkunum

Marita hevur handverksútbúgving sum slaktari. Hon hevur starvast á skrivstovuni síðani 2004, og tekur sær av limarøkt, limasamskifti o.a.

Útgevari: Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík
Blaðstjórn: Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Skrivstovutíð: Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverkarin@handverk.fo · www.handverk.fo

SJÓNARHORNIÐ: ELI BRIMSVÍK

Núverandi starv:
Formaður í Havnar Handverkarafelag

Kona:
Oda Brimsvík

Børn:
Tonny, Magni og Dan

Arbeiðsroyndir:
Eg fór mín fyrsta túr til skips 13 ára gamal, tá hevði eg mist hugin at ganga í skúla og vildi royna sjólívið.

Tá ið eg hevði verið um 1½ ár til skips var eg vorðin sannførdur um, at hetta ikki akkurát var tað eg vildi. Tá var eg so heppin at fáa læruplass á Stranda bátasmiðju, sum bygdi 15 og 20 tons útróðrarbátar. Í februar 1973 fór eg í læru.

Men her má eg líka nevna, at eg var eitt sindur óheppin við tað, at Bátasmiðjan á Strondum steðgaði upp eitt tíðarskeið, og tí flutti eg læruplass til Skála skipasmiðju. Tað hevði so eisini við sær, at læruheiti bleiv broytt frá skipsbyggjara til skipssnikkara vegna tað, at á Skála var einki træskipasmíð, men stálskipasmíð. Har var um tað mundi sera nógv at gera, nýbygningar, umbyggingar og viðlíkahald.

Á Skála skipasmiðju vóru nógvir dugnaligir handverkarar, sum lærdu væl frá sær, so tað var eitt gott læruplass.

Tá eg var komin til seinasta árið av lærutíð míni, flutti eg til Havnar og slapp at gera læru mína lidna á Tórshavnar Skipasmiðju. Har dámdi mær eisini væl at vera, sera dugnaligt fólk, ríkiligt var at gera. Tá eg stóð við sveinabrævinum í hondini var eg fegin, tí tá var eisini boðið mær at halda fram sum sveinur á Tórshavnar Skipasmiðjuni.

Her kann eg skoyta uppí, at um hetta mundi var ikki møguligt hjá lærlingum, at vera limir í Havnar Handverkarafelag, tá vóru lærlingar fyri seg í einum lærlingafelag. Men nú eg var útlærdur sveinur gjørdist eg limur í Havnar Handverkarafelag. Hetta var í 1978.

Tekniski skúli:
Eg gekk í Tekniska Skúla í Tórshavn.

Besti sangari:
Vit eiga nógvar góðar og evnaríkar sangarar, men uttan at taka nakað frá nøkrum, má eg nevna Ingolv av Reyni. Hann hevði eina fantastiska rødd.

Besta bók:
Nú eri eg ikki nakar lesihestur, men ein sum hevur fylgt mær síðani eg sum 13 ára gamal fór mín fyrsta túr til skips er Bíblian. Annars dámar mær væl føroyskar bøkur.

Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:
Var við at tilevna nýggja gólvið í Havnar Kirkju *(Dómkirkjuni).* Arbeiðið bleiv gjørt á gamla meiarínum í Tórsgøtu. Alt bleiv gjørt við handamboðum, ið vóru gjørd til endamálið. Tilfarið ið nýtt var, var ráskorið og kom úr einum skógarøki í Svøríki, ið einans verður nýtt til umbygging/endurbygging av gomlum og søguligum bygningum. Vit vóru tveir føroyingar, eg og Hans Dam á Argjum saman við tveimum svenskarum, sum gjørdu arbeiði. Tað var sera áhugavert og læruríkt.

Hvussu eitur besti handverkarin, sum tú veit um:
Tað finnast nógvir sera dugnaligir handverkarar, og ein úr rúgvuni kundi verði Petur Hans Poulsen, sum í fleiri ár var bedingsmeistari á Tórshavnar skipasmiðju, sum hon tá kallaðist.

Hvør heldur tú hevur mynda tín persón mest:
Kona mín.

Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:
Tað má verða abbi mín í Klaksvík,Poul Sofus Borðoy 1902-1969 sum var ein av stovnarunum av Klaksvíkar Handverkarafelag og seinni eisini Føroya Handverkarafelag. Ein annar,sum eisini hevur hugtikið meg er langabbi mín Símun Jens Jensen 1873-1934 sum var við til at stovna Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag. Hetta vóru framskygdir menn, sum tordu at ganga ímóti streyminum.

Hvør er tín størsta fyrimynd:
Míni fantastisku fosturforeldur á Strondum, har eg vaks upp.

Hvat heldur tú um eftirløna hjá Havnar Handverkarafelag:
Hon er góð, gott ískoyti til fólkapensjónina.

Hvat heldur tú um samlagstryggingina hjá Havnar Handverkarafelag:
Eg haldi, at hon er góð.

Hvat heldur tú er størsta avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:
Tað finst nokk einki einsíðugt svar, men tá álit og dygd ganga hond í hond, kann ikki nógv ganga galið.

Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:
At tað gongst mínum kæru gott og, at vit búgva í verðsins besta landi.

Hvat kann øsa teg:
Bilførarar, ið ikki hava funnið útav, hví vit hava rundkoyringar, tað finnast alt og nógvir av teimum, og annars fólk í grenja um smáting.

Fartelefon:
Iphone 6.

Telda:
Appel.

Bilur:
BMW 320i.

BOGI BECH JENSEN REKTARI Í MARKNAGILSDEPLINUM

Bogi Bech Jensen varð settur í starv sum rektari í Marknagilsdeplinum í august mánað í ár.

Í stuttum kunnu vit siga, at Bogi Bech Jensen byrjaði sína útbúgvingarleið á Københavns Maskinmesterskole í 1996.

Aðrar útbúgvingar:

- Vinnuháskúlin: 1997
- Fróðskaparsetur Føroya: 2002
- Newcastle University: 2004
- Danmarks Tekniske Universitet: 2006
- Harvard Business School: 2013
- Fróðskaparsetur Føroya: 2014
- Rektari í Marknagilsdeplinum: 2015

Bogi Bech Jensen er 37 ára gamal og hevur eina breiða útbúgvingarliga, akademiska og verkliga bakgrund umframt týðandi leiðsluroyndir.

– Hann er útbúgvin maskinmeistari (2000) og sivilverkfrøðingur og hevur síðani tikið Ph.D frá Newcastle University í Onglandi, har hann undirvísti í nøkur ár. Hann hevur leiðsluútbúgving frá Harvard Business School í USA, hevur verið sjálvstøðugt vinnurekandi og samstarvað við nógvar altjóða fyritøkur.

– Bogi Bech Jensen hevur royndir sum deildar- og granskingarleiðari á DTU í Danmark í 4 ár og hevur verið settur professari og útbúgvingarleiðari á Fróðskaparsetri Føroya. Hann hevur góðar undirvísingarførleikar og hevur skrivað vísindaligar greinar um hættir at undirvísa. Hann hevur verið kosin „ársins undirvísara“ av teimum lesandi á Danmarks Tekniske Universitet.

– Bogi hevur í sínum størvum uttanlands eisini royndir innan samanleggingartilgongdir, m.a. Risø og DTU og hevur verið við í størri byggiverkætlan innan undirvísingarøkið.

Mynd er tikin í sambandi við, at Bogi fekk heiðursgávu frá "AEG Elektrongrunninum. Á myndini frá høgru: Rektarin á Danmarks Tekniske Universitet, Bogi Bech Jensen, Fríða av Fløtum (kona Boga). Uttast til vinstru: Kristian Stubkjær leiðari á Elekto-deildini á Danmarsk Tekniske.

Heiðraður við AEG Elektronprísinum

Í 2013 fekk Bogi Bech Jensen, ph.d. og lektari á Danmarks Tekniske Universitet ársins elektronpris frá AEG Elektronfonden.

– Granskingin hjá Boga Bech Jensen innan økið „malandi elektriskar maskinur“ hevur vakt stóran áhuga hjá nógvum vinnufyritøkum, segði deildarstjórin Kristian Stubkjær í grundgevingini fyri at lata Boga Bech Jensen heiðursløninga.

– Malandi elektriskar maskinur finnast m.a. í vindmyllum. Nógvar metrar uppi í eini vindmyllu hevur tað avgerandi týdning, hvussu haldførar, lættar og virknir generatorarnir í mylluni kunnu blíva. Í gransking síni hevur Bogi Bech Jensen bæði arbeitt við at betra um orkuna á vindmyllugeneratorunum og optimering av sniðnum.

– „Á tann hátt hevur tú funnið besta pláss-

Heiðursgávu frá danska AEG Elektrongrunninum

Í 2013 fekk Bogi heiðursgávu frá *„AEG Elektron grunninum“* fyri undirvísing og gransking sína á Danmarks Tekniske Universitet. AEG Elektron grunnurin er danskur, í viðtøkunum hjá grunninum verður greitt soleiðis frá endamálinum: AEG Elektronfondens Elektronpris er på 50.000 kr. og uddeles en gang om året til 'at fremme den tekniske videnskabelige udvikling inden for det elektrotekniske område og på denne måde bidrage til at give dansk industris nuværende og fremtidige medarbejdere en bestandig fyldigere og videregående uddannelse.

PROFESSARI GJØRDIST REKTARI

Rektarin á Danmarks Tekniske Universitet ynskir Boga tillukku við heiðursgávuni frá "AEG Elektrongrunninum"

ið í granskingini í einum týdningarmiklum øki, sum hevur stóran týdning fyri danska samfelagið," segði Kristian Stubkjær vegna Danmarks Tekniske Universitet.

– Hann rósti eisini undirvísingini hjá Boga Bech Jensen: „Tú ert ein verulig studentamagnet,"segði han um Boga. Hann hevur drigið at sær nakrar av bestu lesandi á økinum, samstundis er hansara cv nú ein merkisverdur listi av tíðarritsgreinum og ráðstevnuíkøstum.

Um heiðursløna hjá AEG Elektronfonden

AEG Elektronfondens Elektronpris er uppá 50.000 kr. og verður latin eina ferð um árið fyri „at fremme den tekniske videnskabelige udvikling inden for det elektrotekniske område og på denne måde bidrage til at give dansk industris nuværende og fremtidige medarbejdere en bestandig fyldigere og videregående uddannelse."

– AEG Elektronfonden varð stovnaður í 1989 av Preben Momsen – táverandi stjóra í AEG Danmark. Í kreppuni í 1990unum yvirtók DTU ábyrgdina av at lata heiðursløna. Rektarin fyri DTU hevur síðani grunnurin varð stovnaður fyri 25 árum síðani sitið í stýrinum fyri grunnin.

Í sambandi við handanina tók deildarstjórin Kristian Stubkjær m.a. eisini soleiðis til: *„Jeg må indrømme, at jeg faktisk er lidt imponeret over Bogi Bech Jensens indsats: Det lå nemlig ikke i kortene, at du skulle være lektor på DTU, da du sejlede som maskinmester i fiskeriflåden og på krydstogtskibende i Caribien." Bogi Bech Jensen fortalte i sin takketale, at det var kommet fuldkommen bag på ham, at han skulle have prisen. Faktisk var han blevet forholdsvis forundret, da han – efter en paraglidingtur på Gran Canaria, hvor han var forhindret i at tage sin telefon – fandt en telefonbesked fra DTU's rektor, som havde en „sag" han gerne ville drøfte:*

– „Rektor og jeg er ikke sådan dagligt i kontakt med hinanden. Så min første tanke var, hvad har jeg gjort galt?" Da Bogi Bech Jensen fik ringet tilbage til DTU's rektor og fik den fulde forklaring, nemlig at han var AEG Elektronprisens modtager i 2013, blev han både lettet og glad.

BOGI BECH JENSEN

ARBEIÐSROYNDIR OG ÚTBÚGVINGAR

Bogi byrjaði sína útbúgvingarleið í 1996 í Københavns Maskinmesterskole og helt fram í Vinnuháskúlanum har hann í 2004 tók hægri maskinmeistaraprógv.

Seinni hevur hann tikið fleiri universitetsútbúgvingar t.d. á Danmarks Tekniskeuniversitet, Newcastle University og Harvard Business School. Bogi hevur undirvíst á fleiri universitetum har hann eisini hevur siti í granskingarstørvum. Granskingin hjá Boga Bech Jensen innan økið „malandi elektriskar maskinur“ hevur vakt stóran áhuga hjá nógvum vinnufyritøkum

• Executive Education in Management, juni 2013 – mai 2014

Harvard Business School Executive Education, Boston, Massachusetts, USA. The topics covered include: Strategy & Innovation; Adaptive Leadership; Strategy in a Changing Environment; Negotiations, Organizations and Markets; Disruptive Technological Innovations; Commercializing Science; Project Management; and Leadership & Networking. (was admitted with full funding from The Danish National Advanced Technology Foundation.

• Doctor of Philosophy, Electrical Engineering, okt. 2006 – des. 2009

Newcastle University, UK. Was a fulltime research student for one calendar year. After that continued for another 2 years and 2 months part-time while working fulltime as Research Associate and Lecturer at Newcastle University and later as Associate Professor at DTU. The defence was on the 10th March 2010. My area of research was electrical machine design with particular emphasis on improving the efficiency of asynchronous machines.

• Master of Science, Electrical Power Engineering, sept. 2004 – aug. 2006

Newcastle University, UK. Received the highest average mark at the university and was awarded with the Overseas Research Student (ORS) Award worth £ 27,000 and the Newcastle International Postgraduate Scholarship (NIPS) Award worth £ 9,000.

• General Engineering, aug. 2002 – juni 2004

University of the Faroe Islands, Faroe Islands.

Was studied general engineering and science while working full-time to supplement my marine engineering education and prepare for post graduate study.

• Marine Engineering, aug. 1997 – juni 2000

Marine Engineering College, Faroe Islands. Received the highest average mark ever given at the Faroese Marine Engineering College. The late Mærsk McKinney Møller greeted me in person during one of my final oral examinations.

• Workshop Training, jan. 1996 – des. 1996

Københavns Maskinmesterskole, Denmark.

MÓTTØKA FYRI BOGA BECH JENSEN Í TEKNISKA SKÚLA

Í sambandi við at Bogi Bech Jensen tók við starvinum sum rektari í Skúladeplinum við Marknagil tann 1. august 2015, skipaði Mentamálaráðið fyri almennari móttøka í Skúlaheiminum fríggjadagin 9. oktober.

Hetta gjørdist ein hugnalig løta við fleiri røðum og sangi. Starvsfólkini í køkinum í Tekniska Skúla høvdu staðið fyri at skapa eitt hugnaligt umhvørvi og matgjørt so gestirnir fingu ymiskt forkunnugt undir tonnina.

Egon Øregaard skúlastjóri í Tekniska skúla bjóðaði øllum at vera vælkomnum og greiddi frá, hvat var á skránni.

Tey sum fluttu fram røðu vóru: Rigmor Dam, landsstýriskvinna. Helena Dam á Neystabø, løgtingskvinna. Herleif Hammer rektari í Føroya Studentaskúla og Bogi Bech Jensen rektari í Marknagilsdeplinum.

Til móttøkuna var stórt borð dekka við nógvum góðum mati og drykkuvørum.

Rigmor Dam, landsstýriskvinna:

Bogi, fyri stuttum vart tú professari á Fróðskaparsetrinum. Í dag ert tú rektari í størsta útbúgvingarstovni landsins

Undir móttøkuni vendi Rigmor Dam landstýriskvinna sær til Boga Bech Jensen við hesum orðum: Í tær er bæði hugur og dugur, og tú ert ein góð fyrimynd fyri lærarar, starvsfólk og næmingar. Tað sigst, at tú eisini hevur bæði beinini á jørðini. Og júst hetta er umráðandi, tí vit vita, at fólk, sum hava bæði beinini á jørðini, hanga ikki í trøunum.

Um søguligu gongdina fram ímóti bygging av Marknagilsdeplinum greiddi Rigmor Dam landsstýriskvinna soleiðis frá: Líta vit aftur um bak, so skulu vit heilt aftur í 1998, tá orðið „depil“ av álvara kom á politiska breddan. Ja, langt áðrenn bæði tú og eg vóru uppfunnin í depilshøpi. Í 2006 kom fyrsta lógaruppskotið, sum fevndi um sjálvsognarstovnarnar Tekniski skúli og Føroya Handilsskúli. Síðani kom Føroya Studentaskúli uppí, og nýtt lógaruppskot varð lagt fyri tingið í 2008.

Men enn var langt á mál, tí nústani í 2013, eftir trupul kreppuár, setti undanfarni landsstýrismaður hakan í lendið her úti í Marknagili. Tá segði Landsverk m.a. Tað krevur tíð og neyva fyriskipan at gera hesa ætlan frá verklagslóg til veruleika. Og rætt er tað.

Men nú síggja vit hvønn dag skúlan taka skap her í Føroya størsta byggiverkætlan, sum vit eru so ómetaliga spent uppá at taka í nýtslu.

Framtíðin hjá „deplinum“

Nú er stundin komin at líta frameftir og savna okkum um tað mest týðandi av øllum.

Vit vita, at ein nýggjur skúladepil ger onki í

Undir móttøkuni fyri Boga Bech Jensen greiddi Rigmor Dam - í røðu síni – frá óvanligu útbúgvingarleiðina hjá Boga Bech Jensen, hon tók soleiðis til: Tað var maskinmeistaraútbúgvingin, sum birti upp undir hug tín til lærdóm. Tú flutti til Onglands og bleiv sivilverkfrøðingur á Newcastle University, har tú eisini gjørdist doktari. Haðani gekk leiðin til Danmarkar í starvið sum deildar- og granskingarleiðari á DTU (Danmarks Tekniske Universitet), har tú slapst at gera tær royndir í at leggja stovnar saman. Hóast alt hetta, hevur tú ikki sæð orsøk til at setast aftur, men hevur nýliga nomið tær leiðsluútbúgving á Harvard Business School í USA. Eisini hevur tú tað mesta av tíðini verið virkin í vinnuni.

Í 2011 vart tú kosin besti undirvísari á DTU, í 2013 fekst tú AEG Elektron heiðurin fyri tína gransking, og fyri fáum døgum síðani kundi vit aftur lesa um enn ein granskingarheiður.

sjálvum sær. Vit vita, at ein nýggj skipan og ein nýggjur bygnaður gera onki í sjálvum sær.

Ein skúli er tey fólkini, ið virka og arbeiða har, ein skúli er hvør einstakur næmingur, hvør lærari og hvørt starvsfólk. Tað eru tit, sum halda gerandisdagin í skúlanum uppi. Tað eru tit, sum tryggja námsfrøðiligu og fakligu dygdina í undirvísingini. Og tað verða eisini tit, sum koma at leggja lunnar undir framtíðina í skúladeplinum.

Endamálið

Endamálið við at savna Tekniska skúla, Føroya Handilsskúla og Føroya Studentaskúla undir eina lon er at fáa betri gagn av samskipan, samstarvi og liðileika.

Hetta verður ein spennandi tilgongd, og eisini avbjóðandi at fáa hesar mongu mentanir at draga eina línu uttan at missa tykkara sterku síður ella fakligheitina burtur í svinginum. Umráðandi er, at vit síggja møguleikarnar í hesum og eru hugað at taka við nýggjum hugsanum. Hetta verður millum tínar fremstu uppgávur, at fáa øll við, so øll kenna seg hoyrd, sædd og vird.

Sterkur útbúgvingardepil

Eg eri sannførd um, at ein sterkur útbúgvingardepil verður skaptur við at lurta eftir hugskotum, ynskjum og atfinningum. Og har verða tíni fremstu amboð samskifti, samskifti og meira samskifti. Tí í málinum og í livandi orðinum finnur tú veruleikafatanina hjá hvørjum eintøkum okkara, og skulu allar hesar fatanir røkka einum felags máli, má stútt og støðugt samskifti til.

Alt við tí gylta máli, at tey, sum nema sær útbúgving her, tað verið seg handaliga ella andliga, ella bæði tvey, fara út í lívið við einum prógvi her frá og minnast aftur á lærarar og leiðslur, sum kveiktu teirra ídni, teirra dirvið og teirra skapanarhug. Og at næmingarnir kunnu minnast aftur á góðar dagar, har lærarar og leiðslur og aðrir næmingar birtu uppundir teirra vilja til lívið, teirra hug til lærdóm og teirra førleikar at taka lut í fólkaræðinum.

Tí, tá ið avtornar, er hetta jú endamálið við skúlanum.

At enda í røðu síni tók Rigmor Dam soleiðis til: Við hesum orðum fari eg at ynskja tær og øllum tykkum, sum fara at arbeiða og virka í skúladeplinum, góðan byr.

HELENU DAM Á NEYSTABØ:

BOGI, TÚ HEVUR BORIÐ FRAM NÝGGJAR TANKAR

Undir hátíðarhaldinum fyri Boga Bech Jensen takkaði Helena Dam á Neystabø leiðslu og starvsfólki á Føroya Handilsskúla í Havn. Vegna Handilsskúlan boðaði hon eisini frá, at tey øll fegin vilja stuðla undir tilgongdina at skipa tann nýggja Skúladepilin, og vilja eisini gera okkara til, at samskipanin av Føroya Studentaskúla, Tekniska Skúla í Tórshavn og Føroya Handilsskúla í nýggjan Skúladepil, fer at eydnast væl til frama fyri næmingar, lesandi og Føroya land.

Helena Dam á Neystabø hevði nógv góð og rósandi orð at bera Boga Bech Jensen

Og í røðu síni greiddi Helena soleiðis frá støðuni, sum hevur verið hjá skúlunum: Allir tríggir skúlar hava í mong, mong ár verið í svárastu hølisneyð. Allir skúlar skuldu hava nýggjar karmar – og tí bleiv støða tikin til at fara undir at byggja eitt kraftsentur fyri føroyska vitan og útbúgving í Marknagili. Eitt kraftsentur, har allir tríggir skúlar við hvør sínum sermerktu útbúgvingarprofilum kundu røkka málum í felag, sum bera langt fram á leið. Eins og skapa nýggjar ótroyttar møguleikar innan útbúgving í Føroyum.

Til Boga Bech Jensen segði hon soleiðis:

Vit hava við stórum áhuga lurtað eftir tær Bogi, síðani tú komst aftur til Føroyar fyri fáum árum síðani. Tú hevur borið fram nýggjar tankar, nýggj hugskot og sýnt yvirskot og framtakshug og positivan hugburð, sum so avgjørt eigur at íbirta vilja til at vera við í tí projekti, sum tú nú stendur á odda fyri.

Eg havi sjálv haft tann stóra heiður, at verið stjóri á Føroya Handilsskúla seinastu trý árini. Og tað hevur verið ein spennandi tíð, ikki minst merkt av, at henda stóra verkætlan so spakuliga er gróðursett og er farin at vaksa.

Føroya størsta avbjóðing

At tryggja so nógvum ungum føroyingum sum møguligt enn fleiri fjølbroyttar miðnámsútbúgvingar – bæði yrkisrættaðar og lestrarfyrireikandi, man vera tann fremsta uppgávan yvirhøvur fyri okkara land.

Føroya størsta avbjóðing er, at vit missa okkara ungu av landinum. Einasti mátin at venda hesari gongd, er at gera tað enn meira áhugavert at byrja eina útbúgvingar- og yrkisleið í Føroyum. Og byrjanin er altíð á einum miðnámsskúla.

Lærarakórið á Handilsskúlanum skuldi nú framført eitt lag. Men tíverri hava okkara sangarar fingið forfall, so eingin sangur verður kortini. Tá ið vit umrøddu, hvat lærarakórið skuldi syngja, var ein so hittinorðaður at siga, at sjálvandi skuldi kórið syngja sangin *„Til Boga og allar nýføðingar“*. Og vit fingu ein góðan látur burturúr tí.

Men tá ið eg setti meg at lesa yrkingina, so var tað als ikki so burturvið – og eg loyvi mær her at enda at endurgeva seinasta brotið úr yrkingini *„Til Boga og allar nýføðingar,“* sum Jóannes Nielsen hevur yrkt:

Kári Leivsson, okkara fólkakæri „Kári p“ sang nakrar av sínum bestu vísum og setti ein hugnaliga dám á hátíðarhaldi.

Til Boga og allar nýføðingar

Uttan fyri vindeygað
rennur áin
og lurtar tú væl
hoyrist søgan úr teimum stóru fjøllum.
Har býr fjaðurskrýdda sangkórið
sum hvønn morgun
purrar bóndan út...
Og har er vindurin
sum ýlandi fevnir hamrarnar
keldan tann góðvarni grátarin
ið tostan sløkkir
hjá óteljandi spírum.

Skúlastjórarnir og Rektarin: Frá vinstru Egon Øregaard, Bogi Bech Jensen, Helena Dam á Neystabø og Herleif Hammer.

HERLEIF HAMMER REKTARI:

NÚ EIN DUGNALIGUR, ARBEIÐSSAMUR OG FRYNTLIGUR REKTARI ER SETTUR, ER SKÚLIN Í GÓÐUM HONDUM

Í røðu síni tók Herleif Hammer rektari á Føroya Studentaskúla og HF skeiði soleiðis til: Bogi hetta er ikki hissini uppgáva, tú hevur tikið uppá teg. Øll hava vit vitað, at uppgávan at skipa nýggja skúlan her í Marknagili fór at verða ein stór og sera týdningarmikil uppgáva við stórum avbjóðingum. Væntanirnar frá næmingum, foreldrum, starvsfólki og samfelagi sum heild eru eisini øgiligar. Øll vita vit, at henda verkætlanin má ikki miseydnast.

So gott sum allur okkara ungdómur í Miðføroyum skal ganga her – ella noyðist at ganga her. Hesi ungu eru í einum tíðarskeiði, har tey eru mitt ímillum at vera vaksin og børn. Tey eru á veg at finna seg sjálvi og ganga egnar leiðir; tí eru nógv av hesum eisini viðhvørt ótrygg og viðkvom. Hetta mást tú, Bogi, og vit alla tíðina hava í huga, nú brotið verður upp úr nýggjum.

Øll eggini eru løgd í eina kurv, tí er kravið, at verkætlanin her í Marknagili verður ein succes.

Skúlarnir eru gamlir, hava sterkar traditiónir, konservativir viðhvørt siga summi, men uppá ein góðan máta.

Tríggir modernaðir skúlar

Eg haldi ikki, at eg taki munnin ov fullan, tá eg sigi, at talan er um tríggjar sera modernaðar skúlar, hóast bygningarnir kanska siga nakað annað. Á skúlunum hevur trivnaður og faklig dygd altíð verið raðfest hægst. Orsakað av dugnaligum og eldhugaðum starvsfólkum kunnu skúlarnir eisini vísa á sera góð úrslit, og týdningurin, hesir skúlar hava havt fyri føroyska samfelagið, kann ikki undirmetast. Hetta er sjálvandi eisini viðvirkandi til, at krøvini og væntanirnar til nýggja skúlan gerast enn hægri; minsta kravið er í øllum førum, at trivnaðurin verður eins góður, og at góðskan av útbúgvingunum og næmingunum verður eins høg ella hægri.

Vit fáa nú skjótt ein glæsiligan bygning, sum er slóðbrótandi á nógvum økjum, men vit mugu ongantíð gloyma, at tað eru menniskjuni – næmingar og starvsfólk, sum saman við dugnaligari leiðslu skapa innihaldið.

Eitt gott fundament

Nýggi skúlin er eitt monumentalt byggjarí í seks hæddum. Hann er nakað seinkaður, m.a. tí trupulleikar vóru við fundamentinum ella festingini av bygninginum niður í jørðina. Hetta er tíbetur loyst, so hæddirnar uppeftir kunnu byggjast trygt. Somu mynd kunnu vit brúka um innihaldið í skúlanum. Dygdin, fakligheitin og mentanirnar á gomlu skúlunum meta vit er eitt gott fundament at byggja nýggja skúlan á.

Hetta kann ljóða avbjóðandi, men eg haldi kortini ikki at orsøk er til at stúra. Í øllum førum ikki um rætt verður borið at. Vit mugu heldur ikki gloyma, at talan er um ein miðnámsskúla, sum skal bjóða út útbúgvingar, sum vit kenna frammanundan.

Dugnaligur, arbeiðssamur og fryntligur rektari

Nú ein dugnaligur, arbeiðssamur og fryntligur rektari er settur, sum hevur drúgvar royndir og vitan innan leiðslu á stórum stovnum uttanlands, er skúlin í góðum hondum, og fortreytirnar tí sera góðar. Hetta, saman við drúgvu royndunum og góða kunnleikanum til næmingarnar og samfelagið, sum skúlarnir sita við, eigur eitt gott úrslit at spyrjast burturúr – eitt úrslit, sum vit eru spent uppá og gleða okkum til, og sum vit og Føroyar kunnu vera errin av.

Í røðu síni undir móttøkuni tók Herleif Hammer rektari á Føroya Studentaskúla og HF skeiði soleiðis til: So gott sum allur okkara ungdómur í Miðføroyum skal ganga her – ella noyðist at ganga her. Hesi ungu eru í einum tíðarskeiði, har tey eru mitt ímillum at vera vaksin og børn. Tey eru á veg at finna seg sjálv og ganga egnar leiðir; tí eru nógv av hesum eisini viðhvørt ótrygg og viðkvom. Hetta mást tú, Bogi, og vit alla tíðina hava í huga, nú brotið verður upp úr nýggjum.

BOGI BECH JENSEN:

MUSICAL PRODUKTION Í HEIMSKLASSA OG KJÓLAR TIL MISS UNIVERSE

Í røðu síni í sambandi við móttøkuna í Tekniska Skúla greiddi Bogi Bech Jensen frá, at tá hann frætti, at søkt var eftir rektara til Marknagilsdeplinum hugsaði hann, at her var helst talan um eitt áhugavert starv, men í fyrsta umfari hugsaði hann kortini ikki so nógv meira um tað. Men tá hann ein dagin møtti Egon Øregaard fall prátið teirra millum inn á, at søkt var eftir rektara til Marknagilsdepilin. Hendan samrøðan hevði so mikið stóra ávirkan á Boga, at hann var sannførdur um, at hetta fór at vera eitt áhugavert og spennandi starv og tá gjørdi hann skjótt av og lat sína umsókn inn.

Og nú hann hevur sitið í starvinum eina tíð er hann vorðin sannførdur um, at hetta var ein skilagóð avgerð – starvið er spennandi og áhugavert, men tað sum hevur størstan týdning eru øll tey dugnaligu starvsfólkini, sum hann nú samstarvar við.

Hann takkaði øllum, fyri ta góðu móttøkuna hann hevur fingið síðan hann var settur í starvið. Hetta fer, at vera áhugaverd og ein spennandi uppgáva hjá øllum starvsfólkunum, sum í dag arbeiða á trimum skúlum, ið nú verða lagdir saman til ein skúla. Hann gleddi seg at koma at samstarva við øll starvsfólkini, tí her eru starvsfólk við sterkum handaligum og sterkum bókligum royndum, – tað er ein serstøk og einastandandi støða hjá einum skúla. Avbjóðingin hjá okkum øllum verður at sameina tríggjar sterkar skúlar til ein sterkan og einastandandi depil, – hann sá fyri sær, at her fer at spretta ein depil, ið fór at geva føroyska samfelagnum:

- ✓ **Føroya besta bilmekanikara**
- ✓ **Yrkingasøvn og skaldsøgur**
- ✓ **Musical produktion í heimsklassa**
- ✓ **Kjólar til Miss Universe**

Í hesum sambandi nevndi Bogi, at tað verður umráðandi at hava eitt tætt og gott samstarv við handverksvinnuna, og við Marknagilsdeplinum verður møguligt at samstarva bæði við føroyskt vinnulív eins væl og Fróðskaparsetur Føroya. Í røðu síni nevndi Bogi eisini, at við Marknagilsdeplinum verður møguligt at útbúgva fleiri lærlingar enn higartil og geva handverkarum fleiri útbúgvingarmøguleikar.

Vit liva í dag í einum kompleksum heimi, og at tað skulu vit megna, í hesum sambandi fór hann eisini at seta sum mál, at Marknagilsdepilin skal vera eitt sentur fyri lívlangari læru.

At enda nevndi Bogi, at hann vónar at kunna geva Føroyum nakað og eitt av lyklaorðum hansara er, at við álitið kemur ábyrgd (with great power comes great responsibility)

Tað verður umráðandi at fáa øll at taka væl ímóti Marknagilsdeplinum; hann gleddi seg at samstarva við øll: starvsfólk, lesandi, lærlingar, lærarar, mammur, pápar, ommur og abbar.

At enda takkaði Bogi teimum sum høvdu skipað fyri hátíðarhaldinum og teimum, sum vóru komin saman í hesum sambandi.

GONGDIN Í ARBEIÐINUM AT BYGGJA FØROYA STØRSTU BYGGIVERKÆTLAN

Skúladepilin verður umleið 19.500 fermetrar til støddar og fer at hýsa 1.300 næmingum. Hóast depilin verður skipaður í trimum sjálvstøðugt arbeiðandi eindum (studentaskúli, handilsskúli og tekniskur skúli) verður talan um ein og sama skúla við felags leiðslu og nógvum felags hentleikum. Byggingin verður formað soleiðis, at undirvísingin kann skipast kreativt, nýhugsandi, eins og hon skal vera fakliga og námsfrøðiliga slóðbrótandi. Til tess at lúka framtíðarinnar ókendu krøv til undirvísing, skal byggingin myndast við smidligum loysnum og fjøltáttaðum rúmleika, eins og partar av skúlanum vera opnir fyri næmingum alt samdøgrið.

Upprunaliga var ætlanin, at Skúladepilin skuldi verða klárur at taka ímóti næmingum í 2014, men grundað á langtíðaríløgukarmin hjá løgtinginum var hetta longt, og nú verður mett at bygningurin verður liðugur til jólar 2016. Við innbúgvi er samlaði fíggjarkarmurin 515 mió. kr.

Skúladepilin verður í seks hæddum.

Undangóðkendu virkini

Tey 21 undangóðkendu virkini, sum bjóðaðu upp á tær 8 stórarbeiðstøkurnar, lótu teirra tilboð inn 28. august 2012.

Tey 21 virkini eru: Aluplast, Anskar Hansen, Articon, Búsetur, Demich, EL.FO, EL-Service, Eykt, HJ Asfalt, Hjálpirót, HS Hansen, IAV, Install, J&K Petersen, LM Electric, Maria Poulsen, El Team Vest, E. Pihl & Søn, Pole Mohr Poulsen, TG-Verk, Uni Zachariasen.

Lisitatiónin var 28. august 2012.

Arbeiðstøkurnar eru hesar:

1. Jørð, kloakk, betong og stálarbeiði
2. Innilokan
3. Innrætting o.a.
4. El-arbeiði o.a.
5. HVS, luftskiftisskipanir o.a.
6. Múraraarbeiði o.a.
7. Málaraarbeiði o.a.
8. Lendisarbeiði o.a.

Afturat hesum 8 stórarbeiðstøkunum er ein 9. arbeiðstøka – byggipláss – sum TG Verk tekur sær av.

Bíligastu tilboðini lógu væl omanfyri játtanarkarmin, og tí varð neyðugt at finna stórar sparingar.

Mars 2014:

Í mars 2014 er jørð- og kloakkarbeiðið farið í gongd. Fundamentir eru stoypt til komandi ítróttarhøllina, bilverkstaðið og ein part av høvuðsbygninginum. Tað næsta verður at byggja uppeftir, og hetta arbeiðið er longu byrjað við ítróttarhøllini. Í løtuni eru umleið 40 arbeiðsfólk á byggiplássinum.

Apríl 2014:

Nú eru 50 arbeiðsfólk á byggiplássinum. Í apríl hevur verið arbeitt við innsíðu veggjum í blokki A *(atrium)* og í blokki B, har ítróttarhøllin er. Harafturat hevur verið arbeitt við planering

ARBEIÐSGONGDIN

í blokki C *(maskindeildin)*. Vegurin til byggiplássið er partvís umlagdur og arbeitt hevur somuleiðis verið við parkeringsøkinum P3.

Mánadagin 28. apríl undirskrivaðu Landsverk og LM Electric størsta sáttmála, sum ein føroysk el-fyritøka hevur gjørt í sambandi við eina byggiuppgávu í Føroyum. Talan var um el-arbeiðstøkuna til Skúladepilin.

Í apríl/mai hevur verið arbeitt við at fáa gjørt parkeringsøkið P3.

Mai 2014:

Blokkur A, ið er hjartað í bygninginum, er nú av álvara við at fáa skap. Í blokki B, ið verður ítróttarhøllin, verður gjørt klárt til at stoypa gólvið. Í blokki C, maskindeildin, er fundamentið nú liðugt og byrjað verður at stoypa veggir um miðjan mai.

Juni 2014:

Fyrsta stálið verður nú monterað á byggiplássinum. Í løtuni arbeiða 45 fólk á byggiplássinum.

Stoypiarbeiðið er framvegis í gongd. Gólvið í komandi ítróttarhøllini er stoypt, og gólvhiti er lagdur í, har tað skal vera. Gólvhiti verður somuleiðis lagdur í blokki A, sum er rundi parturin av bygninginum.

Umframt stoypiarbeiðið er hol nú sett á montering av betonelementum. Tann fyrsta stálkonstruktiónin er komin inn á byggiplássið.

Tann 20. juni hevur Landsverk bjóðað starvsfólkunum á teimum trimum skúlunum til ein kunnandi fund um prosjektið.

Juli 2014:

Av tí at byggiplássið er víðkað nakað, hava íbúgvarnir í Janusargøtu fingið eina nýggja, men fyribils innkoyring, ið tey skulu nýta fram til 2016.

Grivið er oman av á parkeringsøki P1 framman fyri Skúlaheimið og skjótt verður farið í holt við planeringina.

Monteringin av stáli er av álvara komin í gongd. Afturat hesum verður framvegis arbeitt við at stoypa og við at montera betongelement. Í hesum mánaðinum fer betonarbeiðið á 4 hædd í blokki D eisini í gongd.

Harafurat kann viðmerkjast, at alt landsstýrið nýliga hevur verið á vitjan á byggiplássinum, har tey fingu eina kunning um verkætlanina umframt eina rundvísing úti á byggiplássinum.

August 2014:

Í summar hevur nakað av virksemi verið á byggiplássinum. Miðskeiðis í september verða umleið 50 arbeiðsfólk á staðnum. Arbeitt hevur verið við at montera stálelement, betonelement og betondekk. Seinasta planeringsarbeiðið er nærum liðugt í blokki A, sum er atriumbygningurin.

Nú síggja vit av álvara rúm í byggjarínum og fáa eina hóming av samlaðu støddini.

September 2014:

Betonelementini á 1. hædd eru nú komin upp

á pláss. Dekkið millum 1. og 2. hædd í blokki A, sum er atriumsbygningurin, er monterað. Klárt er at fara undir stoyping av gólvi í atriumsbygninginum og at stoypa stóru trappuna. Trapezplátur verða í løtuni monteraðar á ítróttarhøllina.

Oktober 2014:

Dekkið á 2. hædd er nærum liðugt. Veggir

ARBEIÐSGONGDIN

verða stoyptir og súlur, umframt at stál- og betongelement verða monterað á 2. hædd í blokki C.

Fyrstu betongelementini eru monterað á 3. hædd. Í sambandi við EL- arbeiðstøkuna eru LM-Electric nú fast til arbeiðis á byggiplássinum. Teir eru farnir í holt við at seta upp kaðalar og leggja inn lufskiftisskipan í 1. hædd.

Í oktober 2014 eru fylgjandi sáttmálar undirskrivaðir:

- Arbeiðstøka 5.1. - HVS við Demich
- Arbeiðstøka 5.2. - VVS við Brøndum
- Arbeiðstøka 2.2. – Innilokan, excl. HSHansen við TG-Verk

November 2014:

Stálarbeiðið í blokki C *(verkstaður)* er gjørt, og arbeiðstakarin er farin undir at leggja dekk á 3. hædd í hesum blokki. Í blokki D *(inngongd)* eru kjallaraveggir stoyptir, og fylt er upp framvið. Arbeitt verður framvegis við at leggja leiðingar. Montering av fasadum er farin í gongd.

Desember 2014:

Í desember er dekk lagt á 3. hædd í blokki C, og somuleiðis er dekkið stoypt yvir bókasavnið í atriumbygninginum í blokki A. Fasaduentreprenørurin kom til Føroya í byrjanini av desember og hevur monterað rammurnar til fasaduna í ítróttarhøllini *(B1).* Fasadan er nú klár til glasmontering.

Januar 2015:

Arbeiðið er nú komið so mikið áleiðis, at farið er undir at seta upp útveggir, sum í stóran mun eru úr glasi. Byrjað er við ítróttarhøllini, sum liggur niðast oman móti býnum.

Skúladepilin verður í seks hæddum, og í løtuni verður arbeitt við fáa triðju hædd setta upp. Arbeiðsfólkið er farið undir at seta upp glasútveggirnar á ítróttarhøllini, sum er í tveimum hæddum. Síðani kemur túrurin til verkstaðið, har tekniskar útbúgvingar skulu halda til. Í løtuni verður eisini arbeitt við at seta upp teir røttu veggirnar, ið orsakað av roknifeili hjá ráðgevanum, av fyrstan tíð vóru ov tunnir. Umframt konstruktiónsarbeiðið, sum hevur verið í gongd higartil, er nú skjøtul settur á el- og HVS-arbeiðstøkurnar.

Februar/mars 2015:

TG-Verk arbeiðir í løtuni upp á armeringina av teimum høgu soylunum í atriuminum og stoyping av dekki í blokki D *(inngongdin).* HSHansen hava monterað 4 fasadir, tvær í blokki B (ítróttarhøllin) og tvær í blokki C *(auto/metal økið).*

Apríl 2015:

Stál er monterað í blokki A og D, umframt dekkelementir á 4. hædd í blokki A. Byrjað er at klæða skjøldurin í blokki B og C.

August 2015: Tekja er løgd á blokk B *(ítróttarhøll v.m.)* og C (bil- og maskinverkstaður til næmingar), sum nú eru tættir, og har hiti verður settur á í næstum. Arbeitt verður við veggum á 5. hædd í bygningi A, sum er rundi høvuðsbygningurin, samstundis



sum arbeitt verður at gera betongarbeiðið á 3. hædd liðugt.

Í næstum verður farið undir at inniloka bygning D *(høvuðsinngongd, tónleikahøli og umsitingarbygning)* og at knýta hann í høvuðsbygningin.

At enda mugu vit tí verri nevna, at stórir trupulleikar hava tikið seg upp í byggiarbeiðinum, men vit vóna kortini ikki, at hetta fer at fáa álvarsamar avleiðingar fyri Marknagilsdepilin.

Húsavarðartænastan

Brattalíð 8 | Tórshavn | hvt@hvt.fo | Tel. 29 00 29

OGNA TÆR TÍN EGNA HÚSAVØRÐ

- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

Reinsa við turr-ísi

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandbláseing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.

Betong-saging

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.

Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í sambandi við bygging, umbygging og viðlíkahald av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum...

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. - Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 - spekt@spekt.fo - www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika

Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stil@Snið

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo

Linde Gas

AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass

Upplatingartíðir:
máno, -friggjadag
8:00 - 17:00
Tlf. 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
www.gassola.fo

aquatherm BAXI ROYALSCANDINAVIAN VØLUND VARMETEKNIK

DEMICH P/F
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn
Tel 200 300
Fax 200 301
demich@demich.fo

HVS-VEITARIN
TIL VINNUNA

HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ

Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345

Tí velja handverkarar Demich
- Vit veita bestu ráðgevingina
- Vit umboða dygdarvørur
- Vit hava kappingarførar prísir
- Vit hava góða kundatænastu
- Vit hava døgntænastu
- Vit hava framkomnar blikksmiðju
(*Har vit kunnu tilevna inndekningar upp til 3 m*)

www.grafikmaster.fo

demich
Hiti ▪ Ventilatión ▪ Sanitet

Okkara dygd – tín trygd!
www.demich.fo

Glarmeistarin v/Poul Guttesen.

Søla og montering av lágorkutermorútum, u-virði níður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo

Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466

rør-tænastan
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
Vatn•Hiti•Sanitet•Ventilatión

www.mest.fo

TÆNASTA KRING ALT LANDIÐ

FILTUR

HYDRAULIKKUR

EL-VØRUR

Vitja sølubúðir okkara í Runavík (tel. 301190), Havn (tel. 301100) og á Skála (tel. 301178)

MEST
– álítandi loysnir

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV

Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

Viðgerðartrygging er trygging, sum tryggjar tær eina skjóta og góða viðgerð, um tú gerst sjúk/ur ella ert fyri vanlukku.

Við hesi trygging verður tú effektivt og trygt leidd/ur gjøgnum sjúkravgerð, skurðviðgerð og eftirviðgerð.

Mølholm Forsikring A/S tekur sær av at fáa tær eina tíð á privatsjúkrahúsi ella privatum viðgerðarstovni, sum hevur serkunnleika. Allar vanligar útreiðslur hjá góðkendum viðgerðarstovnum í Føroyum, Danmark, Skandinavia og Týsklandi eru umfataðar í hesi trygging. Tú kanst velja at víðka tryggingina til eisini at umfata flogferðaseðil millum Føroyar og Danmark aftur og fram.

Vend tær til okkum á telefon 345700 ella betri@betri.fo og hoyr meira um okkara Viðgerðartrygging.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón